# Ferð mín til Jerusalem

Ein hugleiðing um eina hugvekjandi ferð til heilaga býin. Ein ferð, sum altíð vil standa ovarliga á listanum yvir ferðaminni, men sum í nógvar mátar gav eina hugtunga broyting í hugmyndini av heilaga Staðnum

**FERÐAMINNI –FYRRI PARTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við føroyska fótbóltslandsliðnum til Jerusalem. At síggja heilaga og søguríka býin, sum í so nógvar mátar hevur verið ein stórur faktorur í søguskrivingini hjá dagsins samfelag.

Tað var snøgt sagt ein møguleiki, sum var ov góður til at lata fara framvið, og tí varð frávik eisini gjørt í vanliga gerandisdegnum hjá miðlunum á hesum ferðum. Pennur, blokkur og telda varð lagt til viks, so skjótt sum venjingin hendan fyrrapartin var av, og so var bara at fara í bussin. Skrivingin til morgindagsins blað mátti bíða til einaferð á kvøldi, tá vit skulu koma aftur úr Jerusalem.

## Bíblian er ein gomul bók

Væl upplagdi ferðaleiðarin á ferðini var Rafi, sum annars hevði verið bilførari hjá FSF-bossunum á ferðini. Upp á sín serstaka hátt - sum oftani eisini var skemtiligur - greiddi væl og virðiliga frá tí mesta, sum var at síggja á leiðini.

Úr Tel-Aviv varð koyrt eftir aldargamla høvuðsvegnum, sum gjøgnum stóran part av mannaættini hevur havt ein ovurstóran týdning fyri handilsvinnuna. Sum bindiliður millum tríggjar heimspartar kundi strategiski týdningurin av Høvuðsvegi 1 neyvan yvirmetast, og tó nógvir og harðir bardagar hava verið førdir um heilaga staðin, so tykist fatanin av hesum millum ísraels-búgvar ikki at vera heilt so gudfrøðilig, sum hon ofta tykist fyri umheimin.

Har er boðskapurin í øllum førum, at valdið á Heilaga býnum í nógvar mátar hevur verið undanførsla fyri bardøgunum. Og at hesir í nógvum førum bert hava havt valdið á týdningarmiklu farleiðini sum endamál.




*Golgatha. Her var tað, at Jesus varð krossfestur fyri syndir okkara. Bara tað at síggja staðið, var ein tankavekjandi uppliving, men eins tankavekjandi var nógv av tí, sum fyrifórst kring halgidómin*

Søguligu støðini á ferðini til Jerusalem eru eisini nógv í tali, tá koyrt verður eftir gomlu farleiðini. At koyra eftir víddunum, har Gud leiddi Móses og ísraelsmenn á teirra leitan eftir lovaða landinum fær ikki annað enn givið eina serstaka kenslu. At tað so ikki var samsvar millum tað, sum heilaga bókin sigur um deyða Móses og tað, sum Rafi segði liggja til jødisku trúnna, var so eitt annað mál.

Í mósebókunum verður staðfest, at Móses varð jarðaður á Móabs-slættanum, eftir at Gud hevði latið hann skoðað heilaga landið. Grøvn hansara er ongantíð funnin, og tað var júst hetta faktum, sum hevur fingið Rafi og aðrar ísraels-menn at hava eina heldur øðrvísi støðu til júst hetta málið.

- Tað er meira sannlíkt, at Móses varð førdur beinleiðis til himmals. Ella at grøv hansara liggur onkra heilt aðrastaðni. Var hann grivin her á staðnum, so høvdu vit langt síðani funnið grøv hansara, men hóast óteljandi royndir hava verið gjørdar, so er hetta ongantíð hent.

Og tó at onkur í ferðalagnum hevði hug at mótmæla hesum postulatinum við skriftina, so var Rafi ikki at vika.

- Sjálvandi er bíblian í nógvar mátar grundarlagið undir okkara trúgv. Men fyri tað er ikki víst, at hvør tann einasti bókstavurin í bókini er sannur. Tit skulu minnast til, at hetta er ein bók, sum í nógvum førum er skrivað fleiri hundrað ár eftir, at hendingarnar fóru fram. Og tí er ikki óhugsandi, at nøkur frávik hava verið í frásøgnunum gjøgnum ymsu ættarliðini, ljóðaði sannførda frágreiðingin.

## Kommersiellur kristindómur

Býurin, Jerusalem, er sum so býttur upp í tveir partar. Fólkavøksturin seinastu góðu 2.000 árini hevur eisini verið stórur her, og tey 700.000 fólkini, sum í dag búleikast í Jerusalem rúmast ikki øll innan fyri gomlu býarmúrarnar.

Nýggjara partin av býnum, har millum annað Knesset sæst, var tí ikki nakað, sum vit høvdu stórvegis stundir at síggja. Ikki meira enn ein skjót gjøgnumgongd frá Rafi, meðan bussurin koyrdi móti gomlu býarmúrunum. Hesir hava sjey portur, har sleppast kann inn, og okkara ferðalag varð ført gjøgnum sonevnda Jaffa-portrið.

At trygdin er í hásæti, var kanska ikki altíð eins sjónligt í Ísrael - sammett við ta fatan, sum umheimurin oftast fær av landinum. Men innan heilagu múrarnar var eingin slingur í valsinum. Tað kom tó okkum til góðar, at vit hesa ferð vóru partur av landsliðshópinum, tí í øllum førum vórðu vit lætt og elegant leiddur uttan um allar vaktarskipanirnar á staðnum.

At kalla upplivingina innan gomlu múrarnar fyri eitt vónbrot, hevði helst verið at tikið dekan ov rívan til. Men hóast søguliga upplivingin í allar mátar var ovurhonds stór, og hóast barnatrúgvin fekk sítt at hugsa um, so slapst ikki undan einari støðugari órógv. Eini órógv, sum groft sagt leiddi tankarnar móti einum kommersiellum kristindómi.

Við ríku søguni er tað sjálvsagt, at Jerusalem er eitt av fremstu - og helst tað fremsta - ferðamálið í Ísrael. Og tí var ikki óvæntað, at hópur av lokalum handilsfólkum høvdu sína støð her. Men tað hóskaði



*Tey tilbiða staðið, har Jesus likam varð lagt, eftir at líkið varð tikið av krossinum*